BARNA- OG ÚTBÚGVINGARMÁLARÁÐIÐ

# Starv sum fyrstilærari í Kaldbaks skúla

**Barna- og útbúgvingarmálaráðið sóknast eftir einum dugnaligum leiðara, ið hevur áhuga fyri námsfrøðiligari og fakligari menning og hegni at átaka sær leiðslustarv í føroyska fólkaskúlanum**

Starvið sum fyrstilærari í Kaldbaks skúla verður lýst leyst til setanar frá 1. august 2023. Í Kaldbaks skúla eru 24 næmingar í 1. - 6. flokki og 7 næmingar í forskúla. Tríggir lærarar og ein námsfrøðingur umframt skúlaleiðaran starvast í skúlanum.

**Um starvið**
Fyrstilærarin hevur fyrisitingarligu og námsfrøðiligu leiðsluna og ábyrgd av virksemi skúlans. Høvuðsuppgávurnar eru:

- at standa á odda fyri fakligari og námsfrøðiligari menning
- at fremja eina mennandi starvsfólkaleiðslu og virka fyri, at starvsfólk skúlans hava umstøður fyri fakligari menning
- at virka fyri trivnaði og góðum samstarvi við atliti at næmingum og starvsfólki skúlans
- at skapa virðing fyri skúlanum og umstøður hjá tí einstaka fyri ávirkan og samábyrgd
- at fremja gott samstarv millum skúla og heim og eggja næmingum og foreldrum at fáa sum mest burtur úr skúlagongdini bæði fakliga og sosialt
- At umsita fíggjar- og rakstrarstýring skúlans

**Samstarvsskipan í Tórshavnar kommunu**
Fyrstlærarin virkar í tøttum samstarvi við mentamáladeildina og trivnaðarfyrisitingina, umframt við aðrar deildir í kommununi. Samstarv er millum skúlaleiðararnar við denti á, at skúlaleiðararnir í felag virka fyri at menna skúlaskapin í kommununi.

**Førleikakrøv**
Umsøkjarar skulu hava

- Læraraútbúgving og starvsroyndir í fólkaskúlanum
- Leiðsluroyndir og antin hava ella fara undir skeið innan leiðslu
- Førleika at taka neyðugar avgerðir, at virka fyri trivnaði og einum mennandi læriumhvørvi
- Førleika at orða seg á góðum føroyskum máli

**Setanarviðurskifti**
Setanarøkið er undir Barna- og útbúgvingarmálaráðnum við fyribils tænastu í Kaldbaks skúla. Tann, ið settur verður, eigur at tola broytingar í starvinum. Starvið er flokkað í lønarflokki 31.3 sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag.

**Umsóknir**
Umsókn saman við avriti av læraraprógvi, C.V. og viðmælum skal verða Barna- og útbúgvingarmálaráðnum í hendi í seinasta lagi **22. mai 2023**.

**Umsóknin verður stílað til:**
Barna- og útbúgvingarmálaráðið
Tinghúsvegur 5-7
Postrúm 3279
110 Tórshavn
ella við t-posti**:** bumr@bumr.fo

Tey, ið ynskja fleiri upplýsingar um starvið, kunnu ringja til Jenny Lydersen, undirvísingarleiðara, tlf. 555044.

***Barna- og útbúgvingarmálaráðið** hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, gransking* barnavernd, barnaheilsu og dagstovnaøkið. *Sí heimasíðu ráðsins www.bumr.fo*.